## DAGSINS MEINING

# Tann sterki búskapurin?

Stemmukassarnir vóru ikki meiri enn beindir burtur fyri hesu ferð, tá vit frættu skelkandi boð úr Fíggjarmálaráðnum. Tríggjar dagar eftir valið fáa vit at vita, at inntøkumetingarnar fyri næsta ár eru 200 milliónir lægri, enn sagt var í fíggjarlógaruppskotinum, ið ikki er meiri enn nakrar mánaðar gamalt. Hvat er hetta? Hví var hetta ikki almannakunngjørt áðrenn valið? Hvussu bleiv við føstu búskparstýringini? Hetta merkir jú, at fíggjarlógaruppskotið hjá Karsten Hansen fyri 2004 longu nú gevur eitt risahall. Hví kom hetta ikki út áðrenn valið?

At skattainntøkurnar lækka, hevur verið ávarað um leingi. Andstøðan hevur víst á hetta, men hevur verið kveistrað til viks við veruleikafjarum frasum sum, at ongantíð áður hevur føroyski búskapurin verið so væl fyri sum nú. Eitt er politisk tokutala, men tað kann undra, hví serfrøðin, ið situr næst landsstýrismanninum í fíggjarmálum, ikki hevur rópt varskó, tá alt ov høgu inntøkumetingarnar vóru lagdar fram seinasta heyst. Einki er vorðið radikalt øðrvísi síðani tá. Skriftin stóð longu týðiliga á vegginum. Tað sigur seg sjálvt, at tá útflutningurin av alifiski fer niðurum 10 túsund tons um árið innan stutta tíð, so minka skattainntøkurnar í stórum. Eingin rakettvísund skal til fyri at síggja hetta.

Valstríðið hjá Tjóðveldisflokkinum snúði seg fyri ein stóran part um, hvussu væl hevur verið stýrt fíggjarliga, og hvussu væl landskassin er fyri. Hetta settu aðrir flokkar spurnartekin við og vístu á, hvussu almennu útreiðslurnar hava víst ein ótálmaðan vøkstur seinastu árini, vegna ov veika stýring, har fíggjarmálaráðharrin hevur verið harður, har tað hevur verið óneyðugt, og alt ov passivur, har uppstramming var fyri neyðuni. Almennu umsitingarútreiðslurnar vuksu ov skjótt, meðan skorið var niðast í pyramiduni. Heldur eingi fyrivarni hava verið tikin fyri krepputeknum í vinnuni, ið sjálvsagt koma at ávirka inntøkur landskassans.

Úrslitið síggja vit í dag við einari meting frá Fíggjarmálaráðnum, ið vísir 200 milliónir minni í mettum skattainntøkum fyri 2004. Hetta er støðan 3 dagar eftir valið. Hvussu verður støðan 333 dagar eftir valið? Hvussu fara arbeiðsloysistølini at síggja út hetta árið? Tey fara neyvan at vísa eina pena mynd.

Hetta er ikki svartskygni, men bert ein realistisk metan av framtíðarútlitunum. Komandi samgonga, óansæð hvør hon verður, kemur ikki at fáa ein dans á rósum. Støðan líkist keðiliga nógv støðuni í 1988, har ein annar populerur fíggjarmálaráðharri hjá Tjóðveldisflokkinum lat ein landskassa, ið skuldi vera á tremur, frá sær. Veruleikin vísti seg skjótt at verða ein annar. Í dag hava vit eina 2004 fíggjarlóg, ið 3 dagar eftir valið fór 200 milliónir eftir hæli. Vit mugu bara vóna, at søgan við tjóðveldisfíggjarmálaráðharranum við fullum landskassa ikki endurtekur seg.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# P/F Vágatunnilin: Uttan fyrilit, uttan innlit,uttan eftirlit og uttan álit

**Svenn Aage Ellefsen**



**Skal eingin blanda seg?**
Partafeløg verða vanliga stovnsett fyri at gera íløgur í fyritakssemi, ið skal geva íleggjarum vinning!

At stjórna felag og fyritøku velja partaeigarar nevnd, ið setir stjóra at taka sær av dagliga rakstrinum. Um felagsins virksemi gongur sambært løgdu ætlanunum verður stjórin sitandi og nevndin vanliga afturvald á ársaðalfundum.

Halda nevnd og stjóri ikki løgdu ætlanirnar og ætlaðu úrslitini verða ikki rokkin, tá møtir partaeigarin/-eigarnir á aðalfundinum at taka neyðug stig, at fáa felagið á ætlaðu kósina.

**Óvanligt partafelag**
Men í so másta er partafelagið Vágatunnilin eitt óvanligt partafelag.

Hetta felagið varð í fyrsta lagi einans ætlað at krevja inn eitt nýtslugjald og við tí afturrinda lántøku uppá kr. 80 mió. ið skuldi verða partfígging av Vágatunnlinum. Tá so lánið varð afturrindað, skuldi felagið avtakast.

Her var ikki talan um ætlað avlop ella ætlaðan rakstrarvinning til eigarin/íleggjaran. Her var talan um ein felagsbygnað, ið flest øll vágafólk tóku undir við og fegnaðust um. Vit tóku undir, tí talan varð um eina einfalda, bíliga og gjøgnumskygda fyribilsskipan.

**Vágafólk rinda – onnur ikki!**
Seinni hava so landspolitikkarar – eisini við vælsignilsi frá okkara egnu løgtingsumboðum – avrátt, at partafelagið omaná lánsbyrðina skal bera allar rakstrar- og viðlíkahaldsútreiðslur av bæði tunnli og vegastrekki, og omaná hava teir uttan at himprast lagt hesa stóru eykarokningina í sambandi við byggingina, einar 50 mió. krónur, sum stein oman á byrði hjá okkum, sum skulu afturrinda lántøkuna!

Hví halda landspolitikkarar at vágafólk sjálvi vilja rinda viðlíkahald av vegi og tunnli millum Vágar og meginøki, tá landskassin rindar allar hesar somu útreiðslurnar fyri t.d. Leirvíkar-, Norðskála- og Kollafjarðartunnlarnar hjá teimum ið búgva í Norðstreymoy, Eysturoy og Norðoyggjum?

Úrslitið av øllum er, at tey sum dagliga koyra gjøgnum tunnilin til arbeiðis hava eina alt ov tyngjandi mánaðarliga útreiðslu, og at framfýsni og fyritakssemi í Vágunum ikki kann mennast ájavnt aðrastaðni í landinum orsakað av høga bummgjaldinum!

**Rakstrarútreiðslur og eykarokning**
Hví gjørdist eykarokningin so stór? Hví góðtók partafelagseigarin (løgtings/landsstýri) uttan ábreiðslu, orð ella eið til nevnd og stjórn eina so stóra eykarokning? Og hvønn rætt hevði eigarin, at flyta alla eykarokningina yvir á okkum, ið rinda nýtslugjaldið, tá íløgan annars varð fíggjað við tveimum pørtum í landskassastuðli og einum parti í lántøku?

Vágafólk eru lumpaði so tað stendur eftir. Fleiri eru vit, ið hava mótmælt bæði munnliga og skrivliga, men eigasørt at teir, ið higartil hava rátt, hava so mikið sum hirt at svara! Okkurt hissini: »politikarar skulu ikki blanda seg« hava vit hoyrt! Men um landspolitikarar – t.e. eigarin – ikki skulu blanda seg, hvør skal so gera tað?

**Leiðslan fingið Vágar »í len«**
Sigast kann, at teir ið stjórna Vágatunnlinum (flestallir monopolmenn), hava fingið Vágar í len. Teir eiga nú háls og hondsrætt yvir Vágunum!

Teir áseta eitt toll/ferðagjald millum Vágar og meginøkið, so høgt teimum lystir. Teir hava kostað partafelagnum og vágafólkum eina eykarokning í byggifasuni uppá 50 milliónir, uttan at teimum nýtist koma við nakrari frágreiðing ella undanførslu. Teir mettu ferðslutíttleikan so skeivt, at eingin klárar at gera teimum kunstin eftir.

Teir hava keypt eina innkrevjingarskipan, sum hevur kostað fleiri ferðir tað, tað annars hevði kostað, at havt (t.d. rørslutarnaði) fólk í innkrevjingararbeiðinum.

Teir koyra við hesi innkrevjingarskipanini, sum sleppur fleiri undan at gjalda, so mesti kostnaðurin endar á »kubbunum« og t.e. okkum úr Vágunum.

Teir hava enn ikki fingið trygdina í tunnlinum uppá pláss.

**Eitt egið fitt, lítið kongaríki**
Teir hava eftir stuttari tíð sett so nógv fólk í starv og hava vundið ein so tungan rakstur uppá felagið, at tað sambært teimum sjálvum er neyðugt at krevja inn 25 mió. krónur árliga í fimtan ár (ella tilsamans kr. 375 mió) fyri at afturrinda lántøkuna, ið ætlandi skuldi verða kr. 80 mió.

Teir ætla sær soleiðis at oyðsla burtur bummpengarnar uppá 375 mió. kr. umframt landskassastuðulin uppá 160 mió. krónur ella tilsamans 535 mió. krónur, uttan at okkara løgtingsumboð ella nakar annar higartil hava kravt innlit ella sett nakað spurnartekin við framferðina.
Felagið er sostatt ikki undir nøkrum eigaraeftirliti og eigur av hesum sama einki álit hjábrúkaranum!

**Hvat ætla okkara afturvaldu løgtingsumboð?**
Okkara spurningur er nú, hvørt hetta skal halda fram óbroytt, ella vend skal koma í?

Nú valið er av og tingmennirnir báðir eru afturvaldir (í øllum góðum) kann ein uttan at órógva valið – loyva sær at siga sum er!

Teir hava gjørt alt ov lítið í hesum sambandinum. Jú, í fjølmiðlunum hava teir sett nógv uppskot fram. Meðan ein hevur hildið, at vit skulu koyra ókeypis, hevur ein eykatingmaður mett, at hundrað krónur er hóskandi bummgjald. Tað er so ikki hesum seinna fyri at takka, at vit nú rinda hálvfems!

Onki ítøkiligt uppskot til bata hava teir lagt fyri Løgtingið, ið er einasti partaeigarin, og har teir hava umboðað okkum!

Lat teir tí her verða mintar á, at teir nú mugu taka annað skinn um bak.

Teir skulu, tá teir koma í samgongusamráðingar, beinanvegin krevja, at landsverkfrøðingurin – tað er landskassin – og ikki partafelagið skal rinda rakstur og viðlíkahald av Vágatunnlinum, og at nýtslugjaldið einans skal afturrinda lántøkuna sambært upprunaligu ætlanini.

Tástani fáa Vágarnar fulla nyttu av fasta sambandinum við eini ferðslu upp móti 2000 akførum um dagin og einum bummgjaldi, ið ikki darvar virkseminum í oynni!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

Tað er tørvur á sjúklingavegleiðara burturav:

# Sjúklingaráðgevingin heldur fram, men á hvønn hátt?

**Í hesum døgum verða broytingar gjørdar á Sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn, ið hýsir føroyskum sjúklingum, sum eru í sjúkuviðgerð í Keypmannahavn. Marianna Andreassen, sum undirvísir í H:S (Hovedstadens sygehusfællesskab) og lesur cand. scient. soc, og Kathrina L. Joensen, sum er sjúkrasystir, lesur cand. pæd. psyk og er ráðgevi á »Kræftlinjen og i unge/ sorg« eru als ikki samdar við leiðsluni á Sjúklingahotellinum Tórshavn. Tær halda, at sjúklingaráðgevingin er ein sera týðandi, sjálvstøðug eind, sum ikki kann umstruktureast ella rationaliserast ella sparast, so sum leiðslan er í ferð við, um innihaldið skal verða tað sama. Tær spyrja, um leiðslan í heila tikið hevur fingurin á pulsinum? Og um hetta er valdsnýtsla**

**Marianna Andreassen og Kathrina L. Joensen**





Sum føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar búsitandi í Danmark, við royndum frá Sjúklingahotellinum og Ríkissjúkrahúsinum, kenna vit ábyrgd til at vísa okkara undran um kjakið síðstu dagarnar um føroysku sjúklingaráðgevingina í Danmark. Trupulleikin um at brúka eina játtan rætt, ella fáa tað besta burtur úr henni? Úttalilsini frá leiðsluni um, hvørt tað í heila tikið er tørvur á eini sjúklingaráðgeving?

Sjúklingavegleiðarin er eitt bindilið millum føroysk og donsk sjúkrahús. Tað merkir, at sjúklingavegleiðarin er hjásitari og vegleiðari í samband við viðger á sjúkrahúsi. Hjálpir sjúklingum og avvarðandi at avklára ivaspurningar og at útgreina misskiljingar, og vegleiðir um kærumál og innlit í hesum sambandi. Ein sjúklingaráðgeving er soleiðis eitt gjøgnumgrípandi virksemi, sum ikki kann gersat upp í tímum. Nógv arbeiði liggur í at skapa samband til brúkararnar, starvsfólk og bygnaðin á ymsu stovnunum.

Við tí útbúgving og teimum royndum sjúkrarøktarfrøðingar hava í dag, eru vit formliga útbúnar til eisini at taka okkum av fíggjarligum og samfelagspolitiskum funktiónum. At seta á stovn eina sjúklingaráðgeving merkir, at vit eisini noyðist at hyggja at øðrum viðurskiftum, og í hvørjum samanhangi sjúklingavegleiðingin skal virka.

Tað var heilt afturi í áttatiárunum, at tað varð tosað um at seta á stovn eitt sjálvstøðugt vegleiðaravirksemi. Tað vóru fyristøðukvinnurnar á føroysku sjúkrahúsunum, ið settu fram hetta ynski. Tað var við gleði, at vit fingu hesa sjálvstøðugu skipan fyri næstan trimum árum síðani. Frammanundan var virksemið ein partur av sjúkrasystraarbeiðinum á PHT (Sjúklingahotellið Tórshavn), har man ikki náddi tað optimala, ið liggur í vegleiðaravirkseminum. Tá nýggja hotellið læt upp, var eitt av málunum, at tænastustigið skuldi hækkast, og var m. a. sjúklingavegleiðarin eitt av hesum tænastubetringum. Ein stór betring fyri sjúklingarnar og tey sárbæru avvarðandi í føroyska heilsuverkinum, sum eru í tí serligu støðu, at noyðast langan veg heiman fyri at fáa neyðugu hjálpina. Og tað er við harma, at vit síggja og hoyra, at leiðslan á PHT er í ferð við at oyðileggja hetta framstigið, og tí seta vit fram spurningin, um skipanin í heila tikið veruliga er roynd í verki.

At brúka eina játtan rætt kann hava nógvar innfalsvinklar, men um vit hyggja trongskygd at tí fíggjarliga, kunnu vit skjótt verða samd um at gera eina funktión upp í tímum.

Tá sagt verður, at bert seks tímar eru brúktir um vikuna til hetta virksemi, má hetta byggja á misskiljingar, og gevur hetta tí eina veruleikafjara mynd av hesum virksemi. Tí skilja vit als ikki, at hetta nú skal umskipast til aftur at vera eykaarbeiði hjá teimum, ið dagliga starvast á PHT.

Eingin ivi er um, at sjúklingurin verður gísli í hesum máli – og tað harmar okkum. Vit hava fleiri ára royndir sum sjúkrasystrar, bæði teoretiskar, praktiskar og á leiðslustigi. Vit hava starvast á Ríkissjúrkahúsinum og røktað føroyskar sjúklingar í nógv ár. Báðar hava vit verið sjálvbodnir vitjunnarvinir í H:S í nógv ár, og hava fingurin á pulsinum í mun til tørvin, sum vit síggja hann í dagligdegnum. Sjálvt um bæði vit, presturin í samuelskirkjuni og trúðboðarir frá Kristnastovu hava okkara dagligu gongd á sjúkrahúsunum saman við tí núverandi sjúklingavegleiðaranum, náa vit ikki at nøkta tørvin.

Ein ætlan í hesari stødd, sum eitt sjálvstøðugt sjúkrarøktara-vegleiðara-virksemi, má verða grundað á eina trygga tørvsmeting við greiðum endamáli og ætlan og á greiðar eftirmetingar. Hetta er ein tilgongd, ið má fara fram yvir eitt longri tíðarskeið og byggja á grundleggjandi fakliga og praktiska vitan um, hvat, hví og hvussu tú setur á stovn eitt slíkt virksemi.

Í løtuni er ógreitt at gjøgnumskoða á hvørjum grundarlag leiðslan á PHT hevur tikið hesa avgerð um at um strukturera virksemið til eykaarbeiði hjá verandi starvsfólki. Útdeligeringin av sjúklingavegleiðaravirkseminum til sjúkrarøktarfrøðingarnar, sum dagliga starvast á PHT, fer í mun til í dag, at avmarka møguleikarnar hjá sjúkrarøktarafrøðingunum at loysa ikki planlagdar uppgávur, sum er ein stórur partur av arbeiðinum á PHT í dag.

Sjúklingar, sum eru á PHT, eru í teirri heilt serligu støðu, at teir mugu uttanlands fyri at leita sær viðgerð. Sjúkrarøktarfrøðingar, ið dagliga starvast við hesum trupulleikum á PHT, mugu hava orku og yvirskot til hesar sjúklingar og til dagliga arbeiði, sum er á PHT, tað er ógvuliga umfatandi og fjølbroytt arbeiðsøki. Tað vil siga orka, sum ikki kann gerast upp í tímum í mun til sjúklingartørv bæði fysiskt, psykist og sosialt.

Vit hava báðar starvast á Hotel Tórshavn og vita, hvat hetta arbeiðið ber í sær. Soleiðis síggja vit, at hetta verður meir arbeiði fyri hesar sjúkrarøktarfrøðingar, og tað fer at merkja tænastulækking. Dagliga arbeiði inniber eisini, at tað fyri tað mesta bert er ein sjúkrarøktarfrøðingur á vakt í senn, umframt leiðaran. Hetta hevur við sær, at sjúkrarøktaravirksemið er sárbært, um eitthvørt óvæntað skuldi stungið seg upp, t.d. langtíðarsjúkrameldingar.

Ein kunngerð er komin frá Heilsumálaráðnum í november 2003, ið m. a. snýr seg um at ávísa fleiri sjúklingar til viðgerð í Danmark uttan at nakar avvarðandi er visiteraður við, og samstundis er prísurin fyri uppihald á PHT hækkaður fyri gjaldandi avvarðandi.

Út frá hesum kunnu vit bert vænta, at tað verða fleiri sjúklingar, ið koma einsamallir.

Kunngerðin merkir at tørvurin fyri vitjanum, vegleiðing, hjásita við læknasamrøður og uppsøkjandi og mennandi arbeiðsuppgávur økist. Hetta eru uppgávur, sum sjúklingavegleiðarin hevur í dag, og tí má spurningurin vera, um vit ikki heldur áttu at uppnormerað og útbygt í staðin fyri at umstrukturerað.

Okkara niðurstøða er, at grundarlagið fyri hesari avgerð er ógreitt, og tí seta vit hesar spurningar, sum vit vóna at avvarðandi myndugleikar taka í álvara og vilja virka til at varðveita og útbyggja virksemið.

Heilt greiða niðurstøða okkara er, at sjúklingaráðgevingin er sera týðandi sum eitt sjálvstøðugt virksemið og kann ikki umstrukturerast/rationaliserast /sparast í teirri trúgv, at innihaldið verður tað sama. Og spurningurin má tí vera, um hetta er ein sparing gjøgnum bakdyrnar og manglandi vitan um, hvat ein sjúklingaráðgeving er. Hevur leiðslan í heila tikið fingurin á pulsinum? Er hetta maktnýtsla?

# Sambandsflokkurin er størsti flokkur

**Sambandsflokkurin gjørdist størsti flokkurin í atkvøðutali við valið seinasta týsdag. Tað skerst ikki burtur, hóast bæði fjølmiðlar, politiskir mótstøðumenn og enntá fólk innanfloks tykjast ikki at vilja viðurkenna tað**

**Eilif Samuelsen**



Sambandsflokkurin fekk 586 atkvøður fleiri enn Javnaðarflokkurin og 618 fleiri enn Tjóðveldisflokkurin. Sostatt kann ikki annað enn sigast, at flokkurin hevði eitt gott val, hóast hann fór nakrar atkvøður aftur í mun til seinasta val. Tjóðveldisflokkurin fekk tá ið avtornaði ein sess meira í tinginum, og tað skyldast fyrst og fremst eini órættvísari vallóg. Tann sessin átti Sambandsflokkurin av røttum at havt fingið, siga teir valkønu, og tá hevði myndin verið munandi meira rættvísandi.

Veljarakanningarnar beint undan valinum vístu eina heilt aðra mynd enn valúrslitið gav. Tann fyrsta, sum sendi Sambandsflokkin upp til skýggja, var helst óverulig, men ikki tess minni er tað hon, sum fjølmiðlarnir hava sammett øll tey seinnu úrslitini við, og tí tektu fjølmiðlafólk endiliga ta heilt stóru sensatiónina og kundu leggja øllum Føroya fólki í sinni, at Sambandsflokkurin var tann stóri tapparin.

**Sjónvarpið avger**
Kampurin um at fáa atkvøðurnar frá veljarunum fer í dag fyrst og fremst fram í politisku sjónvarpssendingunum undan valinum. Serliga tær sendingar, sum floksformenninir luttaka í, eru avgerandi fyri, hvar ein stórur partur av flótandi atkvøðunum finna í havn. Tað umboðið, sum ikki her við sínum sjónvarpstekki og talugávum megnar at fáa boðskapin klárt og týðuligt út til hyggjararnar, er púrasta fokin. Og tað er í hesum høpi, at nógv hava víst á, at formaður Sambandsfloksins ikki stóð seg so væl sum hinir. Hon hevur eisini sjálv tikið avleiðingarnar av tí, og er farin frá.

**Beiskur kostur**
Sjálvandi kann tað vera herkin kostur hjá henni at lesa, hvussu blaðfólk útgreina og meta um avrik hennara sum forkvinna, men slíkt hoyrir upp í gerandisdagin hjá einum politikara. Men tað má vera bæði beiskt og sárt at hoyra ein av sínum egnu alment í bløðunum fara so bonskliga fram móti bæði leiðslu floksins og teimum valevnum, sum veljarafeløgini hava sett at umboða seg til valið. So mikið meira av tí at fyrrverandi tingmaðurin í Eysturoynni man hava gloymt, at hann var ein av teimum ítastu at framprovokera formansskiftið fyri trimum árum síðani, og sum førdi til, at nú fráfarni formaður meira ella minni móti sínum vilja varð kosin formaður.

Slíkar uppgerðir, sum ein eftirmeting av einum miseydnaðum vali mugu føra við sær, eiga høviskliga at vera viðgjørdar innanhýsis í flokkinum og ikki í fjølmiðlunum. Tað hevur ikki verið hildið sømiligt at vaska síni skitnu klæði alment.

Regluligi landsfundur floksins verður seinnapartin í mars. Tá verður nýggi formaður floksins funnin.

Sambandsflokkurin er framvegis tann flokkurin, hvørs stevnuskrá flest fólk taka undir við, og Sambandsflokkurin er framvegis tann flokkurin, sum hevur greiðasta og besta boð uppá framtíð Føroya.